TÓRSHAVNAR KOMMUNA

torshavn.fo/hoyringar

# Broyting í byggisamtyktini fyri part av Argjahamri, Argir

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 16. desember 2021 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu fyri part av Arghahamri. Uppskotið til broytingina snýr seg um at broyta;

- part av matr. nr. 256, Kirkjubøur frá 4. grundumráðið til A3 øki, ið er ætlað til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.
- part av matr. nr. 256, Kirkjubøur frá A3 øki til A1, ið er ætlað til sethús og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús.
- matr. nr. 4gs, 4gq, 4 gr og part av 256, Kirkjubøur frá A3 øki til D3, ið er ætlað stórum almennum stovnum.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 22. desember 2021 til 2. februar 2022.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 2. februar 2022.




